# Albert hevur fingið nýggjan venjara

**At Grindavík hevur havt soltna úrtøku og er næstaftast hevur havt við sær at sama uppskriftin í vikuni varð nýtt, sum fyri stuttum kostaði venjaranum hjá Fram starvið**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Tað er ikki bara í Føroyum, at tey bæði feløgini, sum eru niðast á støðutalvuni, hava fingið nýggjar venjarar nú í summar.

Fram, sum er felagið hjá Fróða Benjaminsen og Hans Fróða Hansen, er aftast í Landsbankadeildini. Tað hevði fyrr í summar við sær, at Ion Geolgau og felagið samdust um, at samstarvið teirra millum skuldi halda uppat. Soleiðis var tað í hvussu so er orðað, tá ið útisetarnir í Íslandi fingu nýggjan venjara.

Grindavík, ið er felagið hjá Alberti Sævarssyni, sum í fjør var málverji hjá B68, er næstaftast, og hósdagin hildu teir støðuna vera soleiðis, at best var at royna við nýggjum venjara. Sagt verður, at felagið og Zeliko Stankovic vóru samd um, at venjarin skuldi leggja frá sær, eftir at Grindavík mikukvøldið hevði tapt 2-0 á útivølli ímóti ÍBV í Vestmannaoyggjunum.

Nýggjur venjari hjá Grindavík er Guðmundur Valur Sigurðsson, sum frammanundan var hjálparvenjari. Grindavík er nummar níggju og næstaftast við ellivu stigum, og Fram er aftast við sjey stigum.

# Sær ikki so svart út

**B68 liðformaðurin heldur, at avrikið hesa ferð kundi bent á, at vánir eru fyri størri úrtøku enn higartil í landskappingini**

B68 Í UEFA CUP
*Jóannes Hansen*

Støðutalvan í 1. deild boðar frá, at toftamenn hava nógv at hugsa um, nú tá ið tað nærkast seinnu helvt.

Avrikið hóskvøldið kundi bent á, at tað kanska fer at liggja betri fyri, enn tað higartil hevur gjørt. Herbert í Lon Jacobsen, sum í fitta løtu tíðliga í 1. hálvleiki lá skaddur uttanfyri, var stinnur í miðverjuni, og í onkrum glottum sást, at tað kanska fer at fáast nytta burturúr bulgaranum Stanislav Stankov, sum var á miðvøllinum.



*Øssur Hansen heldur, at Casthillio Andersson kann fáa stóran týdning fyri B68 í seinnu kappingarhálvu*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Mest spennandi tykist vera, hvussu tað fer at hilnast hjá brasilska álopsmanninum Casthillio Andersson. At hann er komin á liðið, heldur liðformaðurin, Øssur Hansen, hava stóran týdning:

– Hann tykist megna nógv sjálvur. Trupulleikin hjá okkum hevur ofta verið, at tað hevur ikki altíð gingið so væl at varðveita bóltin, tá ið vit hava roynt frameftir. Andersson megnar væl at dekka bóltin og bíða, inntil liðfelagarnir koma framvið. Tað hevur stóran týdning, heldur Øssur Hansen, sum var ein tann eyðsýndasti hóskvøldið.

Ólavsøkudag skal B68 spæla í UEFA Cup á útivølli. Síðani verður farið undir aftur landskappingina, og tá skal B68 royna at fáa ágóða burturúr royndunum í UEFA Cup, har luttøkan hesa ferð heilt víst verður liðug á Ólavsøku.

## Spælararnir stuðla Morten Olsen

Spælararnir á danska fótbóltlandsliðnum heita nú á Morten Olsen um at halda fram sum venjari hjá liðnum. Seinastu dagarnar hevur Morten Olsen verið eitt heitt navn til starvið sum týskur landsliðsvenjari, men donsku spælararnir vóna, at venjarin fer at halda sín sáttmála við danska fótbóltssambandið, sum varðar í tvey ár afturat.

– Eg dugi illa at ímynda sær, at DBU kann finna ein venjara, sum er betur egnaður til arbeðið, sigur Niclas Jensen við Ritzau.

## Tann besti uttan felag

Theodoros Zagorakis, sum UEFA valdi til besta spælaran í EM-kappingini í Portugal, hevur einki felag at splæa fyri. Mikludagin fekk hann frítt at fara úr felagnum AEK Athen, sum hevur stórar fíggjarligar trupulleikar.
Zagorakis hevur spælt í fýra ár við felagnum, men nú skal hann finna sær nýtt felag at spæla fyri. Tað verður neyvan nakar trupulleiki hjá tí 33 ára gamla liðformanninum á grikska landsliðnum.

# Julian aftur á blettinum

**At hann økti til 4-2 kann fara at vísa seg avgerandi fyri, um ÍA fer at megna at halda fram í europeisku kappingini**

ÚTISETI Í EUROPA CUP
*Jóannes Hansen*



Hóskvøldið var Julian Johnsson einasti føroyingurin, ið fór av vøllinum sum sigursharri. Á Akranesi høvdu teir í fyrsta undanumfarinum í UEFA Cup kappingini vitjan av FC TVMK Tallin.Úrslitið var 4-2 til heimaliðið, eftir at ÍA í hálvleikinum hevði verið frammanfyri 2-0.

Í 2. hálvleiki stóð eina løtu einki til. Estlendingarnir minkaðu beinanvegin í 2. hálvleiki um munin til 2-1, og tá ið seinna umfarið var fimm minuttir gamalt, varð Stefan Þórðarson vístur av vøllinum, og síðani vóru skagamenn bara tíggju ímóti ellivu. Reyða kortið fekk ÍA maðurin, tí hann hevði rent ælbogan í andlitið á mótstøðumanni. Tíbetur fyri ÍA, so gingu tað bara tríggir minuttir, áðrenn teir aftur vóru frammanfyri við tveimum málum.

Estlendingarnir megnaðu at gera sær dælt av,at teir vóru ein fleiri á vøllinum. Teir minkaðu um munin til 3-2, tá ið eitt korter var farið av 2. hálvleiki. Henda støðan helt sær, inntil vanliga leiktíðin var farin. Harvið tótkist tað sum um estlendska felagið skuldi hava rættuliga góða útgangsstøðu undan heimadystinum. Men í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, eydnaðist tað Juliani Johnsson at økja um ÍA leiðsluna til 4-2.

At ÍA vann við tveimum málum hevur við sær, at teir fara at halda fram í kappingini, hóast teir tapa við einum máli á útivølli í estlendska høvuðsstaðnum Tallin.

Tað er ikki so langt síðani, at Julian Johnsson fyri fyrstu ferð skoraði fyri ÍA í landskappingardysti. Tá ið ÍA í síðsta landskappingardystinum vann 1-0, varð málið skorað upp á brotsspark tveir minuttir undan dystarenda. Brotssparkið varð dømt, eftir at Julian Johnsson við høvdinum hevði roynt ímóti málinum.

Í somu kapping var FH av Hafnafirði á útivølli í Cardiff í Wales ímóti Haverfordwest. Alt bendir á, at tað skal eydnast FH at halda fram í kappingini, eftir at liðið hava spælt í Íslandi á Ólavsøku. FH vann 1-0 í Wales. Einasta málið skoraði vandamikli danski álopsspælarin Allan Borgvardt, tá ið eitt korter var eftir.

# Todi javnt móti Tottenham

**Føroyski álopsmaðurin hjá FCK sigur seg vera væl nøgdan við venjingardystin í Gøteborg hóskvøldið**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Hóskvøldið var FCK í Gøteborg, har teir á Nya Ullevi og frammanfyri stívliga fimtan túsund áskoðarum spældu ímóti eingilska høvuðsstaðarfelagnum Tottenham, sum nú hevur ítróttarstjóra, ið er ættaður úr danska høvuðsstaðnum. Hann eitur Frank Arnesen.

Úrslitið var 2-2. Álvaro Santos legði tíðliga FCK framum, og Thomas Røll, sum var innskiftur í 2. hálvleiki og er um at koma fyri seg eftir drúgva skaðan, javnaði til 2-2. Dean Richards javnaði til 1-1 við stútara eftir horna, og í 2. hálvleiki legði Jermain Defoe Tottenham framum.

Í 1. hálvleiki mannaðu Álvaro Santos og Jesper Bech FCK álopið, og í 2. hálvleiki vóru tað Peter Møller og Todi Jónsson.

Á heimasíðu síni sigur Todi, at hann er væl nøgdur við venjingardystin:

– Eg var við í nógvum álopsspæli, og tað var tætt við, at eg fekk eitt mál, men teir bjargaðu á strikuni, eftir at eg hevði roynt við høvdinum ímóti málinum, sigur Todi Jónsson.

Týskvøldið skal FCK spæla Super Cup ímóti AaB. Tann dysturin verður spældur í Parkini. Um eina viku verður fyrsta umfarið í superliguni á skránni.

Vikuskifti
Nr. 135 • leygardagur • 17. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Danskir fótbóltsgarpar á floti
s. 8





*Í føroyska landslagnum kann tú eygleiða hvussu sólin ferðast eftir himmalinum. Í Føroyum gevur hetta serliga meining, tí tað eru nógvir dagar hvar sólin slett ikki sær, og tá hon so dagar fram aftur, so ber til at síggja hvussu langt hon er rokkin eftir skuggunum í landlagnum.*
*Myndir. Jústinus Leivsson Eidesgaard*

# Nú styttast dagarnir aftur

ÁRSTÍÐIRNAR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Eitt hálvt ár er millum hesar myndirnar, og longsta dag á árinum hoyrdi eg mann siga so uppgevandi, ja nú styttast dagarnir aftur. Rætt er at dagarnir styttast, men dekan og dapurskygd er longu nú at stúra fyri styttri døgum í fyrru helvt av juli, meðan grør um gangandi fót og náttúrar angar í fullum blóma.

Eitt hálvt ár er millum hesar myndirnar, og tær vísa hvussu sólin ferðast eftir himmalinum. Fáar staðir í landinum fær tú betri eygleitt sólina enn á Hellunum, her eg nú arbeiði. Oyndfjarðarfjall sýnir alt árið hvar sólin er stødd á himmalinum, um tú hevur lagt teg eftir at leggja til merkis, og um tú dugir at skyna á við heilt vanligari fornuft.

Styttstadag kom sólin sum ein kíli oman í bygdin, og hitaði bert tvey hús, tey á Marknagili og tey í Garðshorni. Nú um summarið er alt fjallið og øll bygdin fevnd av sólarinnar heita kossi, tá hendan sleppir framat.

Og hví so vísa eina náttarmynd av Oyndfjarðarfjalli nakað eftir Jóansøku fyri at sýna hvussu sólin ferðast eftir himinum. Jú, nú er sólin komin á mál á síni ferð norður eftir, og er á ferð suður eftir aftur. Og tá hon er norðast longsta dag ella dagarnar 21,22 og 23 juni, tá rísir hon í ein landnyrðing og setir útnyrðing. Undan jólum styttsta dag rísir hon í ein landsyning og setir í ein útsynning. Tí gevur tað meining at sýna Oyndfjarðarfjall á náttartíð nakað eftir jóansøku. Vit síggja hvussu allur himmalin er upplýstur norðanfyri av sólini, sum ber er eina lítla løtu undir havsbrúnni og tað er ljósið frá æviga degnum norðarfyri í londunum og havinum norðanfyri pólkringin, sum vit síggja á himmalinum norðanfyri Oyndfjarðarfjall.

Hyggur tú eftir myndini, so hevur tú landnyrðingin har sólin rísur hesa tíðina høgru megin og útnyrðing har sólin setir vinstrumegin og fjallið er hesa tíðina á degnum bikasvart, sætt av Hellunum. Tú sær eisini at myndin er tikin nakað eftir sólsetur.

Ein mynd tikin á nátt undan jólum styttsta dag við Oyndfjarðarfjalli í baksýni vildi sýnt ein svartan himmal, veikt upplýstan av stjørnum ella mánalýsi og tá er myrkt allan dagin, longur tú kemur norður á knøttin, og onki annað lýsir fyri tær enn norðlýsið, ið dregur tjøld eftir himmalinum og mánin sjálvsagt eisini. Og var klárt, so hevði tú hómað Norðstjørnuna, ella Polaris, beint yvir tí lægsta upp í á fjalli, sum við kalla uppi á Lágni. Og hálar tú Norðstjørnuna vinkulrætt niður á fjallið, so fær tú beinan norðan. Men tað er ein onnur søga og hon liggur eitt sindur longur frammi í tíðini.

Dagarnir styttast alsamt, og tað fara teir at gera heilt fram í jólavikuna. Dagurin er longu styttur við umleið einum tíma og 20 minuttum og á Ólavsøku er fríggingarmyrkt. Men tað velst sjálvandi um hvussu skjótur tú er. Á Ólavsøku er skýming í 79 minuttir og so má lýsingin taka tað sama og so eru fýra og ein hálvur tímir til myrkursins leikir. Á Ólavsøku er dagurin er styttur við tveimum tímum og einum minutti.

